# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Til Frits Johannesen á hansara 60 ára degi

*Viðhvørt tá myrkrið lýsir fagurt reytt,*
*og dagsins glæma enn í eystri drálar,*
*tá síggi eg, tú stendur har og málar*
*og gandar litir út á tín palett.*

*Tú sært hitt bleika tám, ið sjónligt grør*
*úr moldum, og sum onnur ikki síggja,*
*sum treður ljósins dansir millum skýggja*
*og varpar litir á ta myrku jørð.*

*Tú eigur landsins ljóð í tíni sál*
*og hugur tín er havsins ríka mál,*
*ið aldur bera inn at svørtum strondum.*

*Tað sigst, at alt er gloymt um hundrað ár,*
*men stjørna tín skal lýsa bjørt og klár*
*sum fjálgir litir undan tínum hondum.*

**Alexandur Kristiansen**

## Til Frits á seksti ára degnum



Í Fuglafirði er tað nokk eingin, sum veit, hvat ið stóð skrivað í stjørnunum, tá ið Hanna og Theodor norðuri í Búð fingu son tann 22. mai 1944.

At hann var kærkomin er onki at ivast í, tí pápin, Theodor, var sjómaður av teim allar frægastu. Hann leitaði um fjarar sjónarringar longu sum ungur, og mongu søgurnar um hansara sjómansdygdir hoyra í dag til tann partin av sjósøgu okkara, sum næstan hevur ein mytiskan dám yvir sær. Mamman, Hanna, var hin stillfarandi og vísa heimakonan, sum úr Oyndarfirði hevði borið so mangt hittinorðið við sær, at hon átti eitt serligt munnheld til at kalla hvørt lívsins fyribrigdi - gamalt mergjað mál, sum Frits týðiliga hevur tikið til sín sum part av lívsbarlastini.

Jú, Frits hevur fingið góðan førning við sær longu í vøgguni. Sum smádrong minnist eg hann mest sum ein eitt sindur hyldligan ribbald, har hurlivasi altíð var rundan um. At hesin hurlivasi var innilæstur skapanarhugur, visti eg ikki fyrr enn seinni, tá ið eg slapp upp í part í sera hugnaligu ófyriskipaðu kvøldsetunum, har vit - uttan at hugsa um klokku ella tíð - kundu sita náttina á tamb og tala og hugleiða um alt og onki. At hoyra Frits práta um Aristoteles og Sofokles, sum vóru teir bara smáir parentesar millum Ansastovumenn og Billustovumenn og allar hinar, sum slitið høvdu durahellurnar í oyndfjarðartúni, var altíð hugtakandi.

Sum barnaárini liðu bleiv tað meirra og meira greitt, at bygdin í Fritsi átti ikki bara ein listin lærdan ribbald, men eisini ein hugfarsligan heimspeking og listarliga væl útbornan listarmann á fleiri økjum, sum á ein natúrligan hátt dugdi at sveima í ríka heimi sínum og koma niður aftur til okkum jarðbundnu við avrikum sínum uttan at bróta seg sundur.

Frits er so við og við blivin til tað multitalentið í landi okkara, sum fólk ikki altíð skilja, men øll eru góð við. Hann er kringur við orðinum, hann dugir at seta tað upp í rútmu og rím, hann dugir at seta teir tónarnar til orð síni, sum júst fáa teimum tað flog, teimum tørvar, hann setir litir á lørift og fær trænum júst ta telging, sum gevur hvørjum kvisti og hvørji lynd tað lív, sum bert hann, ið er góður við tað, hann fæst við, megnar.

Ein maður segði við meg nú ein dagin, tá ið prátið datt inn á Frits, at hann hevði bara ein feil, og tað var, at hann var lærari. Hann skuldi heldur havt brúkt alla sína tíð til listina. Men her dugdi eg ikki at vera samdur; tí júst gjøgnum lærarayrki sítt er tað, at Frits hevur avrikað so ómetaliga nógv við sínum kveikjandi sinnalagi og ósjálvsøkna lyndi.

Í nógvum bygdum kring um í landi okkara vita vit, at mangt av tí, ið hendir, hongur uppi við nøkrum fáum menniskjum, sum vit eru so heppin at eiga í millum okkum. Í Fuglafirði eiga vit Frits, um vit hugsa um, hvat ið hendir á listarliga økinum. Rætt er, at fleiri onnur eru; men høvdu mong av teimum váða sær upp á 'listarpallin', um Frits ikki stóð teimum við lið? - Jú, kanska onkur - men flestu av hesum stillu talentum høvdu ikki váðað hetta, um Frits ikki var "lokomotivið", sum dró alt hetta góða eftir sær.

Í slóð tíni, Frits, er í dag ein aldingarður av alskyns fagururtum innan mangt av tí, ið bylgist innan føroyska listaheimin í dag. Takk fyri, at tú nú í ein mansaldur hevur átikið tær gartnarayrkið í listaheimi okkara, og at tú so mangan hevur givið okkum ein listarligan himmiríkisglotta í gráa gerandisdegi okkara.

Verð heilsaður á sekstiára degnum við øllum góðynskjum um lív og gróður á mongu listarbeitum tínum.

**PM**

## Brúdleyp

Leygardagin 22. mai kl. 13.00 giftast í Ebenezer Synnøve Hatlehol av Vatne, Noreg, og Danjal av Rana úr Havnini.

Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

## Dagurin

**20. mai. Angelica.** Teir kenna onga halga konu við hesum navni.

## Gongutúrur Norður á Skarð

Veðurgudarnir háttaðu sær ikki nóg væl seinasta sunnudag, so ætlaða ferðin hjá Norðoyar Kunningarstovu norð á Skarð varð avlýstur varð tá avlýstur.

Komandi sunnudag 23. mei er so ætlanin at herja á aftur.

Farið verður til gongu frá bygdarhúsinum í Haraldsundi klokkan 13.00 stundisliga. Tekning til ferðina fer fram á Kunningarstovuni.

Ferðaleiðarar verða Andras Sólstein og Jógvan Pauli í Kongsstovuni.

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæra kona mín

**Maria Holm Marstein,**

andaðist á Lágargarði mánadagin 17. mai,
76 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer í dag
kl. 14.00

Vegna tey avvarðandi

**Hákun**

*Tey, ið vilja minnast Mariu, kunnu lata eina gávu til barnalegurnar á Zarepta, konto í peningastovnunum.*

## Ebba Andreassen 50 ár

Gjár, mikudagin 19. mai, fylti Ebba Andreassen í Havn 50 ár. Hon er sjúkrasystir og arbeiddi inntil fyri ikki so langari tíð síðani á endoskopideildini á Landssjúkrahúsinum.

Ebba er ættað úr Klaksvík. Hon er dóttir Fíu og John Høj. Hon er elst av trimum systkjum. Hini eru Jógvan og Joan, sum bæði búgva í Klaksvík.

Í 1977 varð Ebba liðug at læra til sjúkrasystir í Havnini. Stutt eftir flutti hon til Århus at búgva. Maðurin, Jens Andreassen í Ullvøruhúsinum, sum hon varð gift við í 1975, las á lærda háskúlanum í Århus, har tey búðu inntil fyrst í 1985. Meðan tey vóru í Århus, arbeiddi Ebba á Kommunuhospitalinum og seinni á einum røktarheimi í grannalagnum, har tey búðu. Jens hevur so ofta tikið til, hvussu stórur stuðul Ebba hevur verið honum. Ikki minst tey árini tá ið hann las í Århus.



*Ebba saman við yngstu dóttrini, Sáru*

Eftir at Ebba og Jens komu aftur til Føroya at búgva, hevur hon umframt á endoskopideildini arbeitt á psykiatriskari deild og á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum og eisini á hvíldarheiminum.

Í frítíðini er Ebba sera aktiv. Henni dámar væl at fáast við handarbeiði, hon gongur høgt upp í sang og tónleik, og heimið hjá henni og Jensi í Javnagøtu er altíð víðopið, og har kemur nógv fólk á gátt at njóta hugna og blíðsskap.

Ebba og Jens eiga fýra børn. Kirstin, sum er gift Høgna Hammer úr Havnini, lærir til sjúkrasystir í Keypmannahavn. Tey eiga tvey børn - Lea og Levi. John, Rakul og Sára eru saman við foreldrunum uppi í Javnagøtu 1, har tað er opið hús hósmorgunin.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Áki Dimon 70



Í dag, hósdagin 20. mai, fyllir Áki Dimon í Trongisvági 70 ár.

Áki 70 ár, ja er tað bara ikki heilt ótrúligt, at tíðin skal rasa so skjótt avstað. Men hetta er jú tað, sum vit øll mugu sanna, tá ið tey árini eru løgd afturum. Nú er tað næstan við sorgblídni, at vit, sum eru blivin 68 - 70, hoyra børn og ung grenja um, hvussu seint tíðin gongur. Men soleiðis er, og hevur tað nokk altíð verið.

Vit báðir komu at kennast og blivu vinmenn longu í 1955. Tað fyrsta mann staðfesti var, at hann var ikki hvør sum helst. Hann var ein vakur og sjarmerandi unglingi, og var ein, sum javnaldrar sóu upp til. Hann hevði persónligheit, og eingin, sum kennir hann í dag kann mæla ímóti, at allar hesar eginleikarnar hevur hann enn. Tað er sjáldsamt, at ein persónur varðveitir sín lívsfrískleika so leingi sum Áki, og blívur við at hava tann spelkna smádrongin og ungdómin í sær.

Tað er fáur sum hann, sum hevur hetta sinnalagið altíð at fara undir eina og hvørja uppgávu við slíkum bjartskygni og trúgv uppá, at tað letur seg gera. Men treytirnar fyri, at allar tær mongu uppgávur og áhugar, sum fylla lívið hjá Áka, eru sjálvandi eisini viðføddar gávur og evni at leggja til rættis.

Við eitt sovorðið høvi, sum tá ið ein fyllir hálvfjerðs, koma oftast minnir fram frá teimum ungu árunum. Í okkara føri er tað kanska heldur ikki so løgið, tí tann tíðin, vit høvdu mest saman var nettupp í ungdóminum innan fyri eitt tíðarbil uppá eini tíggju ár. Vit høvdu so nógv saman bæði í bø og haga og á sjógvi og landi, eisini burtur í øðrum londum. Fyri mær var tað størsta, vit upplivdu saman, túrurin ígjøgnum Europa í 1957 á motorsúkklum. Tað er ikki langt frá, at vit vóru fyrstu føroyingarnir, sum koyrdu so langan túr í útlondum uppá júst tann mátan. Eg skal ikki siga tað heilt vist, men eg haldi tað. John bróður sáli og eg høvdu manga hugnaliga løtu tá ið vit prátaðu um og mintust tær mongu spennandi hendingarnar á hesum langa túri, bæði í álvara og gaman.

So skiltust okkara vegir, hóast tað ikki varð so langt ímillum. Tú vart verandi á Tvøroyri, og eg fór til Havnar. Eg minnist tað heilt ótrúliga góða vinalagið, sum var ímillum teg, Signar, Jenis, Lilleba og meg, og so eisini tá ið John bróður kom aftur niðri frá. Tað vinalagið var nakað heilt fyri seg, tí vit vóru allir so hjartaliga vælkomnir inni í heim-unum hjá hvørjum øðrum. Foreldrini hjá okkum tóku altíð væl ímóti okkum, og høvdu altíð tíð til eina góða diskusjón um mong viðurskifti afturvið einum drekkamunni. Tey vóru góð við okkum, og tóku okkum í álvara og við virðing, hóast ættarlið var ímillum.

Àki, eg eri altíð glaður um at hava kent teg øll hesi árini, og ikki minst takksamur fyri, at tú fekk lív í meg aftur eftir svimjitúrin við strondina í San Sebastian á sinni.

Hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

Vónandi fáa vit onkra hugnaløtu aftrat inni við Rangá ella á Tanganum, ella vit fara onkran túrin saman í Suðuroynni ella aðrastaðni, eitt nú á motorsúkklunum.

Eg ynski eisini Jonny, børnunum og abbabørnunum tillukku við tær.

Vinarlig heilsan

**Thomas kal**

## Fjølbroyttur listarmaður



Tað eru summi fólk, sum fylla meir í lívi tínum enn onnur, fólk sum onkursvegna altíð og allastaðni eru til staðar. Vóru tey ikki, ja, so vantaði okkurt. Tey mestsum hoyra til og eru vorðin ein partur av lívinum, av bygdarmyndini. Og viðhvørt hugsar tú eisini, hvussu hevði verið, um hesi fólkini ikki vóru millum okkum; tað hevði gjørt lívið fátækari bæði so og so. Frits er eitt av hesum fólkunum, sum við sínum skaldsliga og listarliga anda hevur ríkað ikki bara okkara bygd, men alt landið við sínum evnum at vera til. Her er av sonnum eitt menniskja, sum við sínum tokka til alt livandi og sínum fjálga humori hevur gjørt gerandisdagin lættari og litríkari hjá bæði stórum og smáum.

Tann 22. mai fyllir Frits Johannesen 60 ár, og hóast árini siga sum er, er hann enn líka spelkin sum fyri tjúgu árum síðan. Hvønn leygarmorgun er hann at síggja í svimjihylinum, har hann leggur pensjonistunum lag á og sjálvur svimur sínar obligatorisku tíggju longdir. Og fara vit oman í bygdina, so er Frits har sum ein snælda, ið vindur dagsins fjølbroyttu litir upp á seg, ella, er veðrið til vildar, sæst hann í neystinum, har báturin stendur og bíðar og ynskir seg út á fjørðin at flóta.

Frits er føddur tann 22. mai 1944 í Fuglafirði, sonur Theodor Johannesen úr Fuglafirði og Johannu f, Anthoniussen úr Oyndarfirði. Hann er giftur við Alexandru f. Hansen úr Fuglafirði og eiga tey tveir synir: Theodor Erling og Jóhan. Frits tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla 1967 og hevur verið lærari í Fuglafirði síðan tá.

Hann var á ársskeiði á DHL 1978-79, har hann serliga legði seg eftir at læra meira um tónleik og sang. Í 2000-01 var hann aftur á ársskeiði, har málningalistin var høvðusfakið.

Frits hevur eisini roynt segt sum politikara; árini 1976 - 84 sat hann í Fuglafjarðar bygdaráð, bæði skeiðini sum varaborgarstjóri og seinna skeiðið eisini sum formaður í mentanarnevndini.

Annars er Frits virkin sum kórleiðari. Síðan 1980 hevur hann stjórnað Fuglafjarðar gentukóri, og síðan 1984 Fuglafjarðar sangkóri. Eisini hevur hann stjórnað Fuglafjarðar manskóri í mong ár.

Víða hevur hann ferðast við sínum kórum, og hevur serliga gentukórið verið væl móttikið, har tað hevur vitjað. Minnist serliga fagnaðin tað fekk á Noregsferðini í 85. Har varð sungið bæði í kirkjum og úti í guðs fríu náttúru; serliga tann frálíka konsertin í Trollhaugen var eitt upplivilsi, sum seint verður gloymt. Og ikki bara tað. Har var so nógv annað. Sum altíð, tá ið Frits er við. Niðri í fjøruni varð sungið.

Blikastilt var vatnið, meðan tónarnir hjá Grieg og Moe vundu seg upp millum trækrúnurnar og mestsum spældu sær í tí bjørtu summarnáttini.

Og so gongutúrarnir hetta sama árið, har Frits sum altíð var tað savnandi punktið.

Skaldskapur og tónleikur og list vóru felagsnevnarin. Har vórðu yrkingar siteraðar og har vóðru sangir sungnir. Og í hesum norsku skógunum kendu vit okkum sum berarar av tí list og tí skaldskapi, sum átti ræsur so víðar, at vit fataðu tað ikki.

Eisini í Fuglafjarðar hornorkestri hevur Frits verið virkin, og var hann við til at stovna tað í 1969.

Men tað, sum hann serliga er kendur fyri, er sum listamálari. Í 1969 fekk hann í lag málningaframsýningina á Varmakeldu, og hevur hon verið fastur táttur øll árini síðani.

Og hevur hann sjálvur luttikið hvørja ferð. Eisini aðrastaðni hevur hann sýnt sínar málningar fram, bæði í Danmark, Noreg, Svøríki og Týsklandi. Seinast hann sýndi fram var í listaskálanum í apríl mánað í ár.

At Frits er fjølbroyttur í sínum virki, er einki yvir at dylja. Umframt tað, sum longu er nevnt, at hann er virkin innan tónleik og málningalist, er hann eisini vertskapsmaður av teim frægu. Og tær røður hann kann halda, sjálvandi uttan handrit, eru at meta sum besta undirhald, ein kann hugsa sær, og ofta eru tær eisini merktar av einum hugsandi og filosofiskum anda.

Av meira ítøkiligum úrslitum av hansara arbeiði kann nevnast, at hann hevur prýtt suðursíðuna á Mentanarhúsinum við einum stórum málningi, og vitjar ein skúlan í Fuglafirði, so síggjast allastaðni bíløt og høggmyndir, sum hann hevur gjørt saman við næmingunum.

Og so ikki at gloyma teir sangir, sum hann hevur yrkt og umsett, og sum hava verið sungnir av kórunum, hann hevur stjórnað. Serliga ein hevur sett seg fastan í minnið, tað er sangurin, hann hevur gjørt til Fuglafjørð og sum er so sera góður at syngja. Hann er yrktur til lagið: Der går en dans på Sunnanø.

Tá ið ein maður er so fjølbroyttur, sum Frits er, so er tað næstan sjálvsagt, at onkur sær virði í tí stóra arbeiði, hann ger. Og hevur hann eisini fingið viðurkenning fyri sítt arbeiði. Fyri nøkrum árum síðan fekk hann Mentanarvirðisløn landsins. Og tað er ikki ein og hvør, sum fær hana.

At enda fari eg at ynskja tær tillukku við teimum seksti og mong happadrúgv árini enn.

**Alexandur Kristiansen**